## Írar á knøunum

Tað gongur framvegis stak illa við írska búskapinum, og nýggj tøl vísa, at tað fer at taka drúgva tíð at venda gongdini. Hagtølini fyri árið í fjør vísa, at búskapurin minkaði meiri enn sjey prosent í 2009, og so stóra afturgongd hevur hagstovan í Dublin ongantíð skrásett fyrr. Tey nýggjastu tølini vísa, at afturgongdin, sum byrjaði tíðliga í 2008, er ikki hasað av enn, og búskaparfrøðingarnir vænta ikki at síggja nakað framstig fyrr enn í fyrsta lagi stutt fyri árslok í ár. Írski búskapurin var í stórari menning til 2008, men so kom altjóða fíggjarkreppan.



## Marner verður stjóri

Nevndin fyri Norðoya Sparikassa hevur í morgun sett Marner Mortensen í stjórastarvið í Norðoya Sparikassa. Marner Mortensen hevur verið fyribils settur stjóri síðan 12. mars, tá ið Eyðfinn Reyðberg segði seg úr starvinum. Marner Mortensen er 46 ára gamal, og hevur hann verið varastjóri í sparikassanum síðani 1. januar 1996. Marner Mortensen er útbúgvin civiløkonomur innan roknskap og fíggjarstýring.

# Eg verði ikki gloymd

**Leygarkvøldið slókna ljósini í X Factor kappingini, men Anna Nygaard stúrir ikki fyri at verða gloymd í bræði. Eftir fýra forsíður í BT og eina forsíðu í SE & Hør, verði eg neyvan gloymd fyribils, sigur hon**

X FACTOR

*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Leygarkvøldið endar X Factor kappingin í Danmark. Føroyska Anna Nygaard hevur verið ein av stjørnunum í kappingini í ár, men leygarkvøldið endar løtan í X Factor ljósinum.

Anna Nygaard stúrir tó ikki fyri, at fólk hava gloymt hana mánadagin.

– Eftir fýra forsíður í BT og eina forsíðu í SE & Hør, verði eg neyvan gloymd fyribils, sigur Anna Nygaard.

– Sjálvt um eg eri farin úr kappingini fyri tveimum vikum síðani, verði eg í heilum steðga á gøtuni av fólki, sum vilja hava autografar, og eg havi nógv tilboð um ymiskar konsertir og annað liggjandi, sigur hon.

Hon fekk eisini øðrvísi upplivilsið at enda sum høvuðssøga á forsíðuni í Se & Hør, tí hon hevði funnið sær ein sjeik.

– Eg fekk eitt sjokk, tá ið eg sá blaðið. Eg visti, at tey fóru at skriva um meg, men eg hevði ikki væntað, at eg endaði á forsíðuni. Men søgan var nú ikki so galin, sigur Anna Nygaard.

### Trupult at siga farvæl

Royndirnar siga, at sangararnir í X Factor verða skjótt gloymdir, eftir at kappingin endar. Sangararnir eru rættar stjørnur, meðan X Factor ljósið lýsur, men eftir kappingina fara teir skjótt í gloymskuna.

– Eg stúri als ikki fyri at verða gloymd. Eg stúri meira fyri at siga farvæl við øll tey fólkini, sum eg havi arbeitt so tætt saman við seinastu tíðina, sigur Anna Nygaard.

Nú X Factor kappingin endar við finalubrakinum leygarkvøldið, verður næsta uppgávan hjá Annu Nygaard at gera upp við seg sjálva, hvat hon so skal gera.

– Eg má fara at sortera í teimum mongu tilboðunum, sum eg havi fingið. Men tað verða uttan iva fleiri framførslur komandi tíðina, sigur hon.

### Á pallin í Parkini

Leygarkvøldið verður stóra finalan í X Factor kappingini, og hóast Anna Nygaard ikki er partur av sjálvari kappingini longur, skal hon á pallin at framføra leygarkvøldið.

– Tað er fantastiskt at sleppa at verða partur av stóra showinum. Eg droymdi um at sleppa í Parkini at syngja, og hóast eg ikki eri við í finaluni, eri eg glað fyri, at eg nú fái møguleikan á pallinum, sigur Anna Nygaard.

Tríggir sangarar eru eftir í kappingini – Tine, Jesper og Thomas.

– Eg rokni við, at antin Tine ella Jesper vinna. Kanska endar tað við, at tað verður Tina, sum vinnur, sigur Anna.



*– Eg fekk eitt sjokk, tá ið eg sá Se & Hør. Eg visti, at tey fóru at skriva um meg, men eg hevði ikki væntað, at eg endaði á forsíðuni. Men søgan var nú ikki so galin, sigur Anna Nygaard*
*Mynd: DR*

## Ludvík í Lítluvík

**Hetta vikuskiftið synir Ludvík Breckmann fram málningar í Smiðjuni í Lítluvík**

FRAMSÝNING

*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Frá fríggjadegnum til mánadagin hevur Ludvík Breckman listaframsýning í Smiðjuni í Lítluvík.

Tann ungi havnarmaðurin, Ludvík Breckmann, hevur onkuntíð fyrr sýnt fram nakrar stakar málningar, sum hann hevur málað, eitt nú í Listarglugganum á Ólavsøku.

Men henda málningasýningin teir komandi fýra dagarnar er fyrstu ferð, at Ludvík skipar fyri síni egnu sýning. Í Lítluvík hevur Ludvík einar 20 oljumálningar og nakrar vatnlitsmyndir.

Málningarnir eru av evnum frá tí náttúrliga, um tað hálvabstrakta, men eru mest av persónum undir ymsum umstøðum, veri tær í skemti, vertskapi, dapurleika ella til arbeiðis fyrr og nú.

Framsýningin er opin frá fríggjadegnum klokkan 16.00. Opið er eisini leygardagin, sunnudagin og mánadagin.



*Málningarnir hjá Ludvík eru mest av persónum undir ymsum umstøðum*